## Mourinho tagdi

Tað er ikki ofta, at Jose Mourinho ikki vil siga nakað serligt um ein dyst ella eitt avrik, men soleiðis var støðan eftir 3-1 tapi hjá oddaliðnum Inter fyri Atalanta um vikuskiftið. - Í dag skal eg bara tiga. Eg plagi at rósa mótstøðuliðnum, um tey vinna, hóast vit spæla væl. Men í dag var tað okkara egna mistak, at vit taptu, so eg sigi einki, segði Mourinho við Sky Italia.

## Rangers eltir Celtic

Spenningurin í toppinum í skotsku landskappingini øktist um vikuskiftið, eftir at Celtic tapti á útivølli ímóti Aberdeen. Samstundis eydnaðist tað Rangers at vinna sín dyst ímóti Falkirk, og nú eru bert tvey stig á muni millum liðini. Celtic og Rangers spæla aftur ímóti hvørjum øðrum á Celtic Park tann 14. februar.

KÍF-StÍF 21-20 (10-6):

# Ferð komin á botnliðið

**Við hálvum beini í steypafinaluni tykist KÍF veruliga hava fingið glið á sítt spæl. Sunnudagin køvdu teir vónirnar hjá StÍF um at røkka FM-finaluni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at teir fyri viku síðani meldaðu seg aftur í stríðið um FM-finaluplássini, tá teir vunnu á Neistanum, tveittu strandingar mest sum allan vinningin fyri borð, tá teir vitjaðu í Kollafirði í gjár.

KÍF hevur annars í fleiri førum vístst, at teir væl og virðiliga kunnu bjóða teimum fremstu av, men í avgerandi løtunum hava kollfirðingarnir ikki verið nóg neyvir, og tí hava teir mest sum sum ongan leiklut havt í landskappingini.

Kanska var hóskvøldið vendipunktið hjá KÍF í so máta. Við at basa Neistanum í Havn fekk liðið prógvað fyri sær sjálvum, at dystirnir kunnu vinnast, hóast nógv stendur á, og hetta sjálvsálitið fylgdi teimum eisini sunnudagin.

Og tað gav eisini at bíta seinastu løtuna av dystinum. KÍF hevði annars verið á odda fyri tað allarmesta, men við bara fimm minuttum eftir hevði StÍF strítt seg framum við einum máli. Seinastu løtuna av dystinum vann heimaliðið tó 3-1, og so kundu teir frøast um bara næsta sigurin í landskappingini.

Á talvuni hevði sigurin kanska ikki so nógv at siga fyri KÍF, men kunnu teir byggja víðari upp á hetta, er steypafinalan væl og virðiliga heilt nær.

Hjá strandingum merkti tapið hinvegin, at teir nú aftur er langt frá finaluplássinum, og við stórtapinum í fyrru hálvfinaluni í tonkunum er tí líkt til, at talan nú kann verða um fyrsta kappingarárið í 11 ár, har einki heiðursmerki verður hongt um teir.

*Strandingar høvdu vunnið sær takið á KÍF, men seinastu minuttirnar reistist heimaliðið kortini, soleiðis at næsta landskappingarsigurin hetta kappingarárið kom til høldar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### FAKTA um dystin

**KÍF-StÍF 21-20 (10-6)**
**10 min:** 5-3
**20 min:** 7-4
**40 min:** 13-11
**50 min:** 17-17
**Málskjúttar**
**KÍF:** Ási Dam 9(2), Pætur Johansen 3, Rógvi Weihe 2, Teitur Joensen 2(1), Suni Johannesen 2, Andreas Nielsen 1, Niklas Reginsson 1, Jákup Trúgvason 1
**StÍF:** Sveinur Justinussen 5, Mortan Hansen 3, Rúni Johansen 3(3), Bárður B. Danielsen 2, Hávardur Trúgvason 2, Pauli G. Hansen 2, Cristian Prede 1, Borgar Danielsen 1, André F. Danielsen 1
**Brotskøst:** KÍF 4, StÍF 4
**Útvísingar:** KÍF 3, StÍF 4
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg

Tjaldur-StÍF 35-29 (14-13):

# Málveitsla í Runavík

**Skjúttarnir fingu góðar ræsur, tá Tjaldur og StÍF spældu undirhaldandi dyst í Runavík**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tjaldur heldur framvegis fast í trýstinum, sum teir seinastu umførini hava lagt á VB.

Sunnudagin hevði Tjaldur heimavøll móti StÍF, og eins og sum í hálvfinaluni fyrr í vikuni, gjørdist talan um tryggan sigur til Tjaldur.

Leingi var StÍF tó heilt væl við í til tíðir javna dystinum. Tjaldur hevði hesa ferð nýggja spælaran, Patru Marilena, við á liðnum, og tað merkti, at høvuðsdenturin í spælinum varð lagdur á sterku skjúttarnar, sum eisini veruliga sluppu at royna. Tað gav tó aftur at bíta í hinum endanum, har skjúttarnir hjá StÍF eisini hildu seg framat, soleiðis at talan gjørdist um ein óvanliga málríkan dystin.

Stutt inn í seinna hálvleik eydnaðist tó hjá Tjaldri at betra um flogið, og eftir at tær tá høvdu økt munin til eini fýra-fimm mál, var eingin vegur aftur í dystin hjá hjá StÍF, sum tó støðugt stríddist fyri einum góðum úrsliti.

Sigurin ber við sær, at munurin upp til VB framvegis er fýra stig. Men Tjaldur eigur ein dyst tilgóðar, og longu komandi umfarið eigur Tjaldur aftur heimavøll móti VB, so tá er møguleiki at fáa javnvág í roknskapin.

### FAKTA um dystin

**Tjaldur-StÍF 35-29 (14-13)**
**10 min:** 6-5
**20 min:** 10-7
**40 min:** 21-17
**50 min:** 26-23
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Adina Petrea 12(3), Elinbjørg Hammer 5, Alina Olaru 5(2), Patru Marilena 4, Annika Thomsen 3, Jacoba Langgaard 3, Benedikta Johannesen 2, Sarah Ann B. Thomsen 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8(2), Ninna K. Johansen 8(1), Anna Petersen 5, Sunfríð Johansen 4, Mariann L. Petersen 3, Fríðrún Danielsen 1
**Brotskøst:** Tjaldur 6, StÍF 4
**Útvísingar:** Tjaldur 2, StÍF 4
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen